# Hví forfylgir Útvarpið summum?



GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður

Tað harmar meg, at okkara gamla Útvarp við nú 50 árum á baki hevur hug at forfylgja summum politikkarum.

Í mínum føri hevur samrøða verið gjørd við meg um morgunin, og er hetta tikið av skránni um kvøldið. Ella tá ið eg sendi spurningar, ið eg havi sett í tinginum til Útvarpið, so síggja teir sjálvdan dagsins ljós. Tað er nú soleiðis at tíðindi koma út!

Í gjár bórust tíðindini, at eg var farin í farloyvi í nakrar vikur, og var hetta triðju ferð í hesum 4 ára skeiði.

Jú tit í Kringvarpinum, grundin til at eg fór í farloyvi var tann, at eg kom í eitt ferðsluóhapp, og endaði á skaðastovuni.

Tit í Kringvarpinum hava ongastaðni sæð, at eg eri fari í farloyvi í nakrar vikur, men til og við 20. í hesum mánaði.

Teir 20 dagarnar, eg havi verið í farloyvi, hevur verið vegna sjúku, og tað eru vit ikki harrar yvir. Um tit hava hug at bera tíðindi um mín persón, so eru til vælkomin at ringja til mín, ella floksskrivaran, og *ikki servera lygnir fyri Føroya fólki.*

Og nú verði eg frá, um alt gongur væl, í 13 dagar og ikki í nakrar vikur.

Men eg eri púra greiður yvir, at hetta er beinleiðis forfylging, av ávísum útvarpsfólki, grundað á meiningar mínar á tingi.

# Kórstevnur Føroya fjøruti ár

TÍÐINDASKRIV
*frá Kórsambandi Føroya og kórunum í Tórshavn*

Kórsamband Føroya og kórini í Tórshavn bjóða øllum kórum og sangáhugaðum til Kórstevnu 2007.

Stevnan verður í døgunum 17. til 19. mai í Norðurlandahúsinum, og fyrireikararnir bjóða eina spennandi og fjølbroytta skrá til allar sangáhugaðar stevnuluttakarar.

Kórsamband Føroya hevur 40 ár á baki í ár og henda runda dag vilja fyriskipararnir hátíðarhalda við stórfingnari kórstevnu í høvuðsstaðnum fyri øllum kórum og sangáhugaðum í Føroyum.

Í ár verður høvi at syngja saman við 5 ymsum norðurlendskum kórleiðarum – hesir vera John Højby, Steen Lindholm, Mogens Dahl, Robert Sund og Berharður Wilkinson, sum allir koma at leiða hvør sína verkstovu. Saman við øllum teimum føroysku luttakarunum, verða eisini á leið 100 norðurlendskir sangarar við til stevnuna. Hesir koma úr Svøríki, Dankmørk og Íslandi. Á stevnuni verður, hósdagin 17. mai, møguleiki hjá luttakandi kórunum at hava konsert við egnari skrá - konsertir verða eftir ætlan fyriskipaðar kring alt landið.

Stevnan verður sett hósmorgun 17. mai kl 9 í Norðurlandahúsinum. Nærri fæst annars at vita við at senda ein teldupost til olavasa@post.olivant.fo

Kostnaður fyri alt tiltakið verður kr. 400,-

Kostnaður fyri gallaveitsluna, sum verður leygarkvøldið 19. mai, verður uml. 250,-

Skipað verður fyri kaffi, ábiti og 'aftersinging' allar dagarnar. Tey, ið ynskja seingjarpláss í høvuðsstaðnum á kórstevnuni, verða biðin um at gera vart við hetta, tá meldað verður til.

Høvið verður at melda seg til sum einstakling ella sum kór og tey, ið ynskja at boða frá luttøku, kunnu senda ein teldupost til olavasa@post.olivant.fo áðrenn 1. apríl 2007. Nærri boð um stevnutilgondina verða send út í apríl.

## Krabbameinssjúk børn og foreldur hava opið hús

TÍÐINDASKRIV

Eins og í fjør hevur Bólkurin við foreldrum at krabbameinssjúkum børnum opið hús 15. februar frá klokkan 16.00 til 18.00 í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum á Grønlandsvegi 58 í Havn - 15. februar er altjóða dagur fyri krabbameinssjúk børn. Foreldrabólkurin vónar, at nógv nýta høvið at støkka inn á gólvið henda dagin; ikki bara tey, ið eru sjúk ella í viðgerð í løtuni, men eisini tey, sum hava havt krabbamein sum barn ella ung.

Foreldrabólkurin, sum hevur seks ár á baki, er ein virkin bólkur. Tey skipa javnan fyri tiltøkum børnunum at frama. Hesa stuttu tíðina bólkurin hevur verið til, hava børnini saman við foreldrum og systkjum verið bæði uttanlands og her heima og ferðast.

Á hvørjum ári fáa 1-2 børn í Føroyum staðfest krabbamein og tí legst aftrat í bólkinum alla tíðina. Føroysk børn, ið fáa krabbamein, eru í serstøðu á tann hátt, at tey ikki kunnu fáa viðgerð og røkt fyri sína sjúku í heimlandinum, men mugu leita av landinum – ofta í sera drúgva tíð – at fáa lekidóm og røkt. Tíbetur vísa hagtølini, at nógv tey flestu vinna á sjúkuni.

Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið í hølunum hjá Føroya felag móti krabbameini altjóða dagin fyri krabbameinssjúk børn, sigur Føroya Felag Móti Krabbameini og Foreldrabólkin í tíðindaskrivi.

# Staðarnøvn og kunnleiki til upprunaligu búsetingarnar

TÍÐINDASKRIV

Sunda Bókasavn á Oyrarbakka skipar í komandi viku aftur fyri áhugaverdum tiltaki.

Málfrøðingurin Eivind Weyhe fer mikukvøldið 7. februar, kl. 19.00 at greiða frá um staðarnøvn og teirra uppruna - hví eitur tað júst soleiðis, sum tað eitur?

Fyrilesturin er um staðarnøvn og tann týdning, sum hesi hava, fyri at fáa kunnleika um upprunaligu búsetingarnar.

Í staðarnøvnunum liggur eitt stórt ríkidømi, sum eigur at verða varðveitt, bæði við innsavningararbeiði og við at tey liva sítt fríska lív í gerandisdegnum. Navnið gevur landslagnum ein samleika, sum er virðismikil fyri okkum.

Møguleiki verður at koma við spurningum um staðarnøvn her um leiðir. Kanska fæst svar uppá ymiskt, sum fyrr hevur verið ósvarað.

Aftan á fyrilesturin, sum verður í Skálanum í Norðskála-Oyrar skúla, er ein góður drekkamunnur at fáa á bókasavninum, og høvi verður at lána eina bók heim við..

Sunda bókasavn er opið mikudagar kl. 14.00-16.00 og kl. 19.00-20.00.

Øll eru hjartaliga væl komin.

## Bókakafé í Hafnia Lounge

TÍÐINDASKRIV

Februar er vanliga kaldur, og hóast dagarnir leingjast, og ljóst er, tá farið verður frá húsum um morgunin, so eru kvøldini enn long og bøkurnar góðar at hava at stytta sær stundir við.

Mikukvøldið 14. februar kl. 20.00 verður aftur eitt hugnaligt bókakafé-kvøld við eina spennandi skrá. Marianna Debes Dahl kemur til Havnar at siga frá, og Finnur Johansen fer at "rudda fólkunum slóð". Malan Marnersdóttir fer at greiða frá um at lesa yrkingar hjá Carl Johan Jensen.

Øll eru hjartaliga vælkomin, siga Kunningarstovan og Hotel Hafnia.

# Veðrið heldur sær

**- Um vikuskiftið verður sama veðrið sum seinastu dagarnar – eysturætt og hitin millum frostmarkið og trý stig, sigur veðurmaðurin Petur Skeel**

VEÐUR
*Snorri Brend*

Hann hevur verið eystligur hesar seinastu dagarnar og onkutíð landsynningur.

- Hann verður strúkur í vindi og upp í hvassan vind um vikuskiftið, sigur royndi veðurmaðurin.

Mánadagin væntar hann partvíst regn, samstundis sum hitin hækkar eitt lítið vet, og fer at liggja millum 1 og 4 stig. Og týsdagin verður sama veðrið.

Ikki fyrrenn mikudagin verður lýggjari aftur, og tá fer eisini at regna heldur meiri.

- Men hetta er veðrið sum tað er hesa ársins tíð, staðfestir Petur Skeel.



*- Veðrið er sum tað eigur, sigur Petur Skeel*